Álit

í

løgtingsmáli nr. 61/2022: Uppskot til løgtingslóg um talgilda samleikakortið

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Ruth Vang, hevur lagt málið fram 7. mars 2023, og eftir 1. viðgerð 20. mars 2023 er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 13. og 20. apríl og 4. mai 2023.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við KT-felagið, Bárð Larsen, lektara á Fróðskaparsetrinum, landsstýrismannin í almanna- og mentamálum saman við Almannaverkinum, og landsstýrismannin í fíggjarmálum, Ruth Vang, saman við Talgildu Føroyum.

Beinleiðis orsøkin til, at farið varð undir at menna eitt talgilt samleikakort, var talgilda koyrikortið, sum Akstovan fór undir at menna saman við Talgildu Føroyum. Verkætlanin varð víðkað til at fevna um samleikakort eisini, sum eisini var ein av ætlanunum í verkætlanini Talgildu Føroyar.

Eingin lóggáva er í Føroyum um alment talgilt samleikaprógv í føroyska samfelagnum, og endamálið við lógaruppskotinum er fáa talgilda samleikakortinum viðurkenning sum galdandi samleikaprógv í føroyska samfelagnum eins og t.d. pass og koyrikort.

Tess meira føroyska samfelagið verður talgilt, tess størri tørvur kann verða á einum talgildum samleikaprógvi í ávísum støðum. Sambært uppskotinum skulu 1,6 mió. kr. nýtast til at menna hetta talgilda samleikakort, og nakrar nevndar kommunur fíggja hetta saman við landinum.

Nevndin hevur undir viðgerðini viðgjørt spurningin um kt-trygdina og rættin hjá fólki at halda fram at nýta fysisk samleikaprógv so sum pass, fysiska koyrikortið, fysiska pensjónistakortið frá Almannaverkinum o.o.

Tað er greitt, at enn fleiri persónsdátur við tíðini væntast at verða savnaðar í somu skipanum, Heldini, Vanganum, Mínboks og Skjáttuni, og at tað tí áhaldandi hevur týdning at eftirmeta og menna KT-trygdina fyri hesar skipanir.

Nevndin hevur eisini spurt nærri um tað fysiska talgilda samleikakortið, sum er nevnt í § 5 í lógaruppskotinum.

Nevndin tekur undir við, at Føroyar fáa standard samleikakort, men tekur ikki undir við, at talgilda samleikakortið verður høvuðssamleikakort í føroyska samfelagnum. Mett verður ikki, at ein slík gongd er fólkaræðisliga ella rættartrygdarliga í lagi. Ein slík gongd er sum tað fyrsta ikki inkluderandi fyri teir borgarar í samfelagnum, sum vegna aldur ella av aðrari orsøk ikki hava snildtelefon ella teldil**.** Heldur ikki er rætt at gera slík tól, sum mugu vera boðberi fyri talgilt samleikakort, til kravt "atgongumerki", fyri at ein skal kunna virka sum javnsettur borgari í føroyska samfelagnum.

Nevndin setir tískil fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Heitið á løgtingslógini verður ”Uppskot til Løgtingslóg um talgilt samleikakort”.

2. § 1 verður orðað soleiðis:
”**§ 1.** Talgilda samleikakortið er eitt av almennu samleikaprógvunum í føroyska samfelagnum.”

3. Í § 5, stk. 1 verður ”kann áseta” broytt til: ”ásetir”.

4. § 5, stk. 2 verður orðað soleiðis:
”*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um undantak til kravið um talgildan samleika til fysiska samleikakortið við tí treyt, at onnur krøv verða sett til at eyðmerkja persónar, t.d. við at vísa pass ella koyrikort.”

Viðmerkingar:
Til nr. 1
Við broytingini verður áherðsla løgd á, at tað snýr seg ikki um talgilt samleikakort í bundnum formi, tí samleikaskjøl kunnu vera so mangt, bæði talgild, men eisini meira siðbundin fysisk samleikaskjøl.

Til nr. 2
Í framhaldi av broyting nr. 1 verður § 1 broytt soleiðis, at ásett verður, at talgilda samleikakortið er eitt av almennu samleikaprógvunum í føroyska samfelagnum. Á hendan hátt slepst undan, at § 1 er orðað út frá eini fortreyt ella væntan um, at talgilda samleikakortið gerst *samleikakortið* heldur enn *eitt samleikakort* millum fleiri. Her verður hugsað um pass, koyrikort, pensjonistakort o.o bæði fysisk og talgild samleikakort.

Til nr. 3 og 4
Vanlig orðing av kunngerðarheimildum er, at ”landsstýrismaðurin ásetir….” Tað framgongur eisini av serligu viðmerkingunum til § 5, stk. 1, at ætlanin er, at landsstýrismaðurin skal áseta nærri reglur um fyrsiska samleikakortið. Tí verður *kann áseta* broytt til *ásetir*.

Fyri at tryggja, at lógaruppskotið ikki ger talgilda samleikakortið til kravt samleikaskjal fyri føroyingar, verður § 5, stk. 2 broytt soleiðis, at tað verður ásett, at landsstýrismaðurin skal áseta nærri reglur um fysiskt samleikakort og undantaksreglu til kravið um talgildan samleika í tí sambandi.

Við hesum broytingaruppskoti og viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 4. mai 2023

Eyðgunn Samuelsen formaður	Beinir Johannesen næstformaður	Bjarni Hammer
Eirikur í Jákupsstovu	Hanna Jensen	Magnus Rasmussen
	Steffan Klein Poulsen	